# Góða mamma, tað var ikki eg...

BERGTÓRA H. JOENSEN
Tjóðveldi



Ein riðil av sambandsfólki fylla í hesum døgum bløðini og tíðindini við boðskapinum um, at hóast tey hava sitið við fíggjarmálum og við politiska valdið í 6 ár, so er tað ikki teirra ábyrgd, at tey reka ein asosialan politikk og skerja tilvildarliga hjá veikastu bólkunum í samfelagnum. Nei, tey hava ikki ábyrgdina av sínum egnu gerðum, tí blokkstuðulin varð lækkaður og frystur fyri 8 árum síðani (!). Og hokus-pokus: Tjóðveldi og onnur hava skyldina!

Á henda hátt kunnu tey í veruleikanum leggja alla ábyrgd frá sær av øllum, sum samgongan undir sambandsleiðslu ger. Allar fíggjarligar avgerðir og raðfestingar kunnu jú bara skjótast inn undir hattin: "Góða mamma, tað var ikki eg. Dreingirnir teir fýrdu meg."

Hesi sambandsfólkini, ið geva øðrum skyldina, eiga at svara okkum uppá hesar spurningar:

Seinastu 8 árini, aftaná at blokkstuðulin varð lækkaður og fastfrystur, er bruttotjóðarúrtøkan hjá okkum – altso tað, sum vit megna at framleiða sjálvi – hækkað við meira enn trimum millardum krónum. Hava vit manglað inntøkur til at betra vælferðarsamfelagið?

Tey seinastu 6 árini, meðan sambandsflokkurin hevur tikið avgerðirnar, hildu tey seg hava so nógvan pening, at tey gávu skattalættar fyri 400 milliónir krónur um árið. Hvussu høvdu vit ráð til tað?

Ein fíggjarmálaráðharri hjá sambandsflokkinum segði aftur og aftur, at føroyski búskapurin var yvirhitaður, og at ov nógvur peningur var sendur út í samfelagið frá tí almenna – og at hetta fór at elva til niðurgongd. Var tað tí, vit høvdu ov lítið av pengum, og skuldu vit havt sent enn meira pening í umfar við at brúka meira pengar úr Danmark? Hvat hevði tá hent í búskapinum?

At tey royna at billa fólki inn, at blokkstuðul er trygdin fyri vælferð í Føroyum, er sjálvandi oyðileggjandi fyri allan vilja og áræði til at skapa eitt sosialt rættvíst og trygt vælferðarsamfelag í Føroyum. Verulig vælferð kann sjálvandi bert tryggjast, tá vit sjálv megna at skapa og býta virðini rætt – og tá vit taka ábyrgd av okkara egnu gerðum.

Ein skilakvinna orðaði seg nakað soleiðis: "...haldi nú ikki, at vit altíð høvdu tað so framúr, við fullum blokki!" Kundi ikki verið meiri samd við henni! Dundrandi kreppan í '90-unum var við fullum blokki.

**Margháttligu broytingarnar einki við sparingar at gera**

At onki mark er fyri, hvussu asosialur politikkur verður vardur við at geva blokkniðurskurði skyldina, sæst serliga á almannaøkinum. Har hava vit seinasta árið sæð hópin av broytingum, hvørs endamál ikki hevur verið sparingar. Lat meg bert nevna nakrar teirra:

Barnaergoterapiin: broyting skuldi til – men til í dag hevur tað bert skapt ótryggleika, ógreiðar útmeldingar, færri ávísingar til børn, sum høvdu gagn av tilboðnum.

Familjudeildin á barnaheiminum: Starvsfólk við drúgvum royndum, førleikum og eftirútbúgving blivu uppsøgd uttan at seta nakað í staðin í langa tíð.

Einkjubarnastudningurin er skerdur, hóast tað bert sparir einar 100.000 krónur.

Framskrivingin av viðbótini hjá pensjónistum (tey, sum ikki hava aðra inntøku) er skerd, hóast sparingarnar eru minimalar.

Stuðulin til familjur, ið hava børn við breki, er skerdur, hóast tað bert eru sera smáar upphæddir fyri landskassan.

Tað løgnasta, vit hava sæð seinasta árið er, at sparingarnar einamest hava rakt almannaøkið. Umframt útbúgvingarøkið. Um sparast skal, mátti fyrsta treyt verið at landsstýrisfólkini lyfta í felag! Vit vita, at málbólkurin sum higartil serliga er tikið frá eru pensjónistarnir. Fimm broytingar eru longu framdar og fleiri eru ávegis, sum taka frá pensjónistunum.

**Øll renna undan**

Kritikkur mín gongur ikki til landsstýriskvinnuna í almannamálum burturav. Eg spyrji, hvar var javnaðarflokkurin, tá allar broytingarnar vóru framdar? Samgongan hevur tikið undir við øllum uppskotunum, annars vóru tey ongantíð framd. Áðrenn uppskot verða løgd niðan í tingið, verða tey fyrst viðgjørd á landsstýrisfundi, síðani er fundur við tingbólkaformenn í samgonguni, uppskot til hoyringar í samgonguflokkum og til seinast er samgongufundur. Harnæst eru uppskotini til 1., 2. og 3. viðgerð í tinginum, áðrenn tey verða endaliga samtykt. Tískil hevur samgongan hópin av møguleikum at broyta og raðfesta øðrvísi, tá uppskot eru ávegis. Samgongan eigur tískil í felag allar hesar margh& áttligu og syrgiligu broytingarnar.

**Hvagar gongur leiðin?**

Hesar royndirnar at geva blokksniðurskurði skyldina, hóast vit hava havt øktar inntøkur og kundu havt lagt pening til síðis, byggja onki land. Tær hyggja bara aftureftir og at tí, sum vit ikki skulu megna – heldur enn at smoyggja upp um ermar og skapa loysnir í mun til:

- At ungdómsarbeiðsloysið er fimmfaldað seinasta árið
- Skilagóðar aktiveringsskipanir
- Ein arbeiðsmarknað fyri øll
- Bøta útbúgvingarmøguleikarnar
- Skapa ein virknan familjupolitikk

**Tjóðveldi verjir vælferðina**

Alt var ikki perfekt undir CHE-samgonguni, men ótrúliga nógv kom av skafti teir 7 mánaðirnar hon var veruleiki. Eitt nú:

- Barnsburðarfarloyvið var longt
- Eyka stuðul til stakar uppihaldarar
- Fleiri útbúgvingarpláss vórðu játtað
- Serlig játtan til barnapsykiatriina
- Brúkaraumboðsmaður stovnaður
- Serlig tiltøk til lesiveik í fólkaskúlanum.
- Bøttar umstøður hjá fyritíðarpensjónistum
- Vinnupolitisk átøk, ið eru grundarlagið fyri at fíggja vælferðina.

Í andstøðu er truplari at fáa uppskot samtykt – men kortini er eydnast tjóðveldinum at varpa ljós á mál, sum tískil eru samtykt – kundi nevnt lívmóðurhálsvaksinuna, hækkaður lestrarstuðul til stakar uppihaldarar og nú fegnast vit um, at deild 1 á psykiatriska deplinum eisini letur uppaftur. Hevur glett meg almikið, tá samgongulimir ella landsstýrisfólk hóast alt viðhvørt hava megnað at taka væl ímóti nøkrum av skilagóðum uppskotunum frá Tjóðveldi.

**Møðsamt andstøðugrenj?**

Skal vera tann fyrsta at ásanna, at tað er geispandi keðiligt at hoyra andstøðu og samgongu skeldast um, hvør gjørdi hetta og hatta. Men viðhvørt er bikarið fult – og tað hendir hjá mær, tá fólk fáa tað at ljóða, sum Tjóðveldi og blokkniðurskurðurin eru rótin til allar illar avgerðir, ið tey sjálvi taka. Tískil vóru hesar reglur neyðugar fyri meg at festa á blað.

# Havnar Fimleikafelag hátíðarheldur 100 ár

*Tíðindaskriv*

Havnar Fimleikafelag verður - eins og Tórshavnar kommuna og fimleikurin í Føroyum - 100 ár í ár, og fer felagið í næstum at hátíðarhalda 100 ára dagin.

Hátíðarhaldið byrjar við almennari móttøku fríggjadagin 13. november 2009 í Müllers Pakkhúsi kl. 15.00 og endar sjálvan 100 ára føðingardagin mikudagin 9. desember 2009.

Nógv spennandi tiltøk vera á skránni frá 13. november líka fram til sjálvan føðingardagin. Millum annað fyrilestar har fimleikurin verður settur á breddan, serlig 100 ára fimleikaframsýning í Norðurlandahúsinum, myndaframsýning í Müllers Pakkhúsi, Gallaveitsla á Hotel Føroyum og mangt annað spennandi. Nærri kunning um 100 ára haldið er at finna á heimasíðu felagsins www.hf.fo

Havnar Fimleikafelag boðar frá, at øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini, gomul sum ung, fimleikarar og ikki fimleikarar. Minnist bert til at ogna tykkum atgongumerki til 100 ára gallaveitsluna á Hotel Føroyum, leygarkvøldið 21. november kl. 19. Atgongumerki á kr. 550,- fáast til keyps í Kunningarstovuni í Havn og í Vogue frá 12. okt. til 14. nov.

**Tiltøk í samband við 100 ára hátíðarhaldið hjá HF:**

**13 – 17 nov.**
Myndaframsýning og café í Müllers Pakkhúsi
mánadag – týsdag kl. 15.00–22.00

**16. nov.**
Ungdómskvøld í Müllers Pakkhúsi kl. 19.00

**17. nov.**
Fyrilestur og kjak undir heitinum "Fimleik sum lívsstíl" í Müllers Pakkhúsi, Fyrilesturin byrjar kl. 19.00.

**21. nov.**
Gallaveitsla á Hotel Føroyum
Atgongumerki á kr. 550.- kunnu keypast í Kunningarstovuni í Havn og í Vogue til og við 14. nov.
Gallaveitslan byrjar kl. 19.00

**28. nov.**
Gallaframsýning í Norðurlandahúsinum – "Hugaheimurin", ein heilsan til HF.
Atgongumerki, vaksin kr. 150,- og børn 14 ár og yngri kr. 75,- kunnu keypast á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum, Kunningarstovuni í Havn, Runavík, Fuglafirði og Klaksvík frá 12 nov. Sýningarnar vera kl. 16.00 og 19.00.

**29. nov.**
Gallaframsýning í Norðurlandahúsinum – "Hugaheimurin", ein heilsan til HF.
Sýningin byrjar kl. 16.00. Atgongumerki, sí omanfyri.

**9. des.**
100 ára føðingardagurin – Allir limir og onnur áhugað eru vælkomin í føðingardag á ovara vølli í Gundadali til felags fimleikaløtu og myndatøku.
Tiltakið byrjar kl. 17.00.

**9. des.**
Bókaútgáva í Ítróttarhøllini á Hálsi. Tá tiltakið í Gundadali er liðugt, verður farið í skrúðgongu niðan í Ítróttarhøllina, har felagið bjóðar øllum kakao og bollar. Eisini verður ymiskt mentanarligt á skránni.

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

# Latið nú frið vera!

PÁLL Á REYNATÚGVU
fyrrverandi borgarstjóri á Sandi



Nú seinasta, og eftir mínum tykki nógv grovasta, ákæran móti mínum persóni, eisini er afturvíst, farið eg at heita á tykkum, mínar lokalpolitisku mótstøðumenn, um at lata frið vera.

Eg boðaði frá beinanvegin, at heldur enn at koma við persónligum verjurøðum, fór eg at lata óheftar myndugleikar taka støðu til ógvusligu ákærurnar. Tað arbeiðið, er nú við seinastu niðurstøðuni liðugtgjørt, og allar ákærur eru afturvístar, sambært ávíkavist óheftum grannskoðara, Innlendismálaráði og Almannamálaráði.

Farið tí at heita á tykkum um at gevast her, í persónligu jakstranini av mær og mínari familju. Eri sannførdur um at okkara leiklutur ikki liggur eftir í royndini at menna bygd, oyggj og land, og valini, hornasteinurin í fólkaræðinum, hava tala sítt týðiliga mál.

Kenni meg somuleiðis sannførdan um at rættvísið altíð sigrar at enda og vit eru, sum familja, glað um at óheftu niðurstøðurnar, eru í trá við okkara egnu fatan av støðuni.

Einki hevði farið av tykkum báðum, Brandi Sandoy og Gerhardi Lognberg, um tit komu við eini almennari umbering, fyri tykkara almennu skriving móti mær og familjuni.

Eg vóni at tit kenna tykkum hógv og at tit ikki eisini seta at mær sum nevndarformanni í SEV. Tað vildi verið ein endalig staðfesting av, at tað bert er manninum tit fara eftir, og ikki eftir politiska førleikanum og politisku úrslitunum.

Vit vilja enn einaferð takka øllum tykkum, sum við bøn og góðum stuðli hava vart og verið um okkum, meðan harðast leikaði á. Hjartans tøkk.